

[www.oljan.fo](http://www.oljan.fo)

**Jan Müller** 24 - 04 - 2012

# Oljuleki í russiska partinum av Arktis

Í tí russiska partinum av Arktis hevur ein oljuleki dálkað eitt øki, sum er í hvussu er 5.000 fermetrar. Lekin er á oljuleiðini Trebs, sum er uppi á landi, og hann byrjaði fríggjadagin, tá menn royndu at lata ein gamlan og læstan brunn upp. Sambært myndugleikunum í Nenetsk eru umleið 500 tons av olju runnin upp úr brunninum um dagin síðani. -Menninir mistu tamarhaldið á brunninum, men til alla lukku er hetta so mikið langt burtur frá strondini, at oljan ávirkar ikki lívið í sjónum, sigur tann russiska deildin av World Wildlife Foundation. Teir lokalu myndugleikarnir í Nenetsk meta, at oljan hevur dálkað eitt øki, sum er umleið 5.000 fermetrar, men landsmyndugleikarnir siga, at økið er nakað størri, kanska einar 8.000 fermetrar. Nenetsk er ein partur av Arkhangelsk-landslutinum við Barentshavið.